*Dagf. 11. apríl 2016*
*HIMR. J. nr. 16/00478*

***Sirið Stenberg***
***landsstýriskvinna***

***Svar***

***uppá***

**fyrispurning nr. 36/2015 eftir § 52a í tingskipanini um bíðitíð til skurðviðgerð fyri ryggtrupulleikar frá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Hvussu long er miðal bíðitíðin at fáa skurðviðgerð fyri diskusprolaps ella líknandi ryggtrupuleika?

2. Hvussu nógvir føroyingar verða árliga skurðviðgjørdir fyri nevndu ryggtrupulleikar?

3. Hvussu nógvir av hesum verða árliga sendir til Danmarkar at skurðviðgerast?

4. Verða hesir sendir til Ríkissjúkrahúsið til viðgerðar ella onnur sjúkrahús?

5. Hvussu nógvir føroyingar árliga verða skurðviðgjørdir á privatsjúkrahúsum, og er talan um samstarv við eitt ella fleiri?

6. Um bíðitíðin til skurðviðgerð gerst so long, at sjúklingar velja sjálvir at søkja sær hjálp á donskum privatsjúkrahúsi, kunnu hesir so fáa útreiðslurnar endurgoldnar samsvarandi kostnaðinum fyri almenna viðgerð?

7. Um ikki, hví?

**Svar:**

**Til nr. 1**
Bíðitíðin er sjálvandi tengd at eini heilsufakligari meting av, hvussu akutt viðgerðin er. Er talan um akutta viðgerð, er ongin bíðitíð. Miðalbíðitíðin til ryggskurðviðgerðir, sum ikki eru akuttar, er umleið 2-4 vikur.

Tá ið talan er um størri skurðviðgerðir, er bíðitíðin í dag umleið 2 vikur. Hesar skurðviðgerðir verða framdar á Ríkissjúkrahúsinum/Glostrup, sum eru løgd saman, og har m.a. ryggskurðviðgerðir í fjør blivu fluttar til Glostrup. Áðrenn skurðviðgerðirnar blivu fluttar til Glostrup, var bíðitíðin munandi longri.

**Til nr. 2**
Í fjør blivu tilsamans 57 føroyingar ryggskurðviðgjørdir. Av hesum blivu 17 skurðviðgerðir framdar á Landssjúkrahúsinum, har ein útlendskur ryggkirurgur arbeiðir eina viku um mánaðin, og 40 skurðviðgerðir í Danmark. Tað blivu 28 føroyingar ávístir og skurðviðgjørdir á privatsjúkrahúsinum Center for Ryg, og 12 á Ríkissjúkrahúsinum/Glostrup.

**Til nr. 3**
Í 2015 blivu 70 sjúklingar sendir til Danmarkar til metingar og skurðviðgerð. Av hesum blivu sum áður nevnt 40 skurðviðgjørdir.

Til hetta er at siga, at skurðviðgerð verður ikki altíð mett at vera rætta loysnin. Rákið er heldur hinvegin soleiðis, at aðrar loysnir verða royndar fyrst, sum møguliga kunnu fyribyrgja skurðviðgerð.

Tað er eisini í hesum sambandi, at Ryggambulatoriið er sett á stovn á Klaksvíkar sjúkrahúsi – og sum verður rikið í samstarvi við serlækna og ryggjatoymi frá Hjørring sjúkrahús. Ambulatoiið hevur virkað í nøkur ár, har ryggjasjúklingar koma í viðtalu. Hugsanin við viðtaluni er at fyribyrgja skurðviðgerð í rygginum – í staðin verður roynt at loysa ryggtrupulleikarnar við venjing og heilivági – og har skurðviðgerð er síðsti útvegur.

**Til nr. 4**
Tað blivu í 2015, 20 sjúklingar sendir til Ríkissjúkrahús/Glostrup, harav 12 blivu skurðviðgjørdir. Sama ár blivu 50 sjúklingar sendir til privatsjúkrahúsið Center for Ryg, harav 28 blivu skurðviðgjørdir.

**Til nr. 5**
Av teimum sum blivu ávístir av føroyska sjúkrahúsverkinum í fjør, blivu sum áður nevnt 28 sjúklingar skurðviðgjørdir á privatsjúkrahúsi. Talan er um Center for Ryg, sum føroyska sjúkrahúsverkið hevur avtalu við.

**Til nr. 6 og 7**

Føroyska sjúkrahúsverkið hevur einans heimild at gjalda fyri viðgerðir uttanlands, har yvirlækni í føroyska sjúkrahúsverkinum hevur ávíst sjúklingin og kautionerað fyri viðgerðina. Yvirlæknar kunnu eisini einans ávísa til viðgerðarstøð, sum sjúkrahúsverkið hevur avtalu við, ella søkja Visitatiónsnevndina um loyvi at ávísa til støð, har eingin avtala fyriliggur. Tískil ber ikki til at geva endurgjald fyri viðgerðir, sum sjúklingurin sjálvur útvegar sær.

Orsøkin til hesa skipan er, at sjúkrahúsverkið má tryggja sær, at tað eru skipaði viðurskifti innan økið – eisini játtanarliga – og at tær viðgerðir, sum tað almenna keypir uttanlands, hava eina ávísa góðsku.

Heilsu- og innlendismálaráðið, 11. apríl 2016

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna